**Leiðreglur fyri ókeypis hallarleigu**

§ 1. Skipanin er galdandi frá 7. august til 15. juli, restina av árinum rinda feløg og sersambond somu hallarleigu sum onnur.

§ 2. Skipanin er bert galdandi fyri kappingarlið hjá ítróttafeløgum í Tórshavnar kommunu, tó er fimleikur undantikin hesum kravi. Skipanin fevnir eisini um sersambond, ið tó skulu gera nærri avtalu við Ítróttaanlegg um virksemið.

§ 3. Hallarumsitingin og svimjihøllin senda mentamáladeildini rokning fyri tann partin av hallarleigu, sum er ókeypis hjá feløgum og sersambondum.

§ 4. Ókeypis hallarleiga er bert til venjing, dystir og kappingar hjá ítróttafeløgunum. Ókeypis hallarleiga hjá sersambondum fevnir bert um venjing.

§ 5. Umbøn um tíðir skal sendast Ítróttaanleggum í seinasta lagi 15. mai á hvørjum ári.

§ 6. Í seinasta lagi 15. juli fáa feløgini tillutað tíðir til venjing, og tað eru bert hesar tíðir umframt dystir og kappingar, ið eru ókeypis. Sersambond fáa tíðir tillutaðar sambært nærri avtalu.

§ 7. Feløg og sersambond rinda vanliga leigu fyri skeiðsvirksemi og venjingar, sum eru uttan fyri tillutaðu tíðirnar.

§ 8. Feløg og sersambond hava skyldu at boða Ítróttaanleggum frá beinanvegin, um tey ikki nýta tillutaðar tímar, so onnur kunnu fáa hesar tíðir. Um feløg og sersambond ikki boða frá, fáa tey eina ávaring. Hendir hetta aftur í sama kappingarári, missir felagið hesar tímar, sum so verða tøkir til onnur feløg i skipanini.

§ 9. Hallirnar skulu gagnnýtast so optimalt sum til ber.

§ 10. Brúk av hallum sambært hesi leiðreglu er fevnt av leiðreglum um lán og brúk av hallum v.m. hjá Ítróttaanleggum í Tórshavnar kommunu

§ 11. Feløg og sersambond í skipanini skulu vera limir í ÍSF.

§ 12. Skipanin fevnir bert um vetrarítrótt. Undantikin hesum kravi eru tey feløg, sum hava verið í skipanini frá byrjan.

§ 13. Nýggj feløg, sum lúka treytirnar, kunnu koma í skipanina, tá tað er samtykt í mentamálanevndini.

§ 14. Hesar leiðreglur koma í gildi dagin eftir, at mentamálanevndin hevur samtykt tær.

*Samtykt á fundi í mentamálanevndini 16. desember 2015, og broytt 27. apríl 2020.*